Frá aðalfundinum hjá Atlantic Petroleum. Við pallborðið frá vinstru: Mortan Johannesen, Óli Hammer, Poul Mohr, Petur Even Djurhuus (allir nevndarlimir), Tórmóður Djurhuus (orðstýrari), Kjartan Hoydal (nevndarformaður), og Wilhelm Petersen (stjóri).

”Nú má gongd skjótt koma á oljuframleiðsluna, tí annars verði eg ov gamal til at uppliva tað”,

Poul Mohr, nevndarlimur

”Støðan (hjá Atlantic Petroleum, red.) broytist fullkomiliga, tá felagið fær cash-flow”,

Kjartan Hoydal, nevndarformaður

”Tey stóru oljufeløgini sleppa nógvum møguleikum, tí tey hava ov dýran rakstur. Hetta gevur smærri oljufeløgum við bíligari rakstri nakrar møguleikar”

Kjartan Hoydal, nevndarformaður

”Hevði eitthvørt annað partafelag í Føroyum komið út við einum halli á 76 mió. krónur, so hevði bæði leiðsla og nevnd verið avhøvdað”

Kjartan Hoydal, nevndarformaður

Illa oljusmurd javnstøða

AÐALFUNDUR
Hilmar Simonsen
hilmar@sosialurin.fo

Millum 40 og 50 partaeigarar vóru møttir til aðalfundin hjá Atlantic Petroleum á Hotel Føroyum leygardagin. Hetta hóast talið av partaeigarum er umleið 7.400. At hetta er ein mannfólkaverð burturav – enn í hvussu er – sást á øllum brøgdum á kynsbýtinum. Har var nevniliga bert ein kvinna millum øll kallkynini.

Hetta fekk orðstýraran á fundinum, Tórmóður Djurhuus, at samanbera støðuna við aðalfundin hjá Pedagogfelagnum, sum eisini var á Hotel Føroyum henda sama leygarmorgun. Har vóru stórt sæð bert kvinnur á tí fundinum, yvir 400 í tali, hóast formaðurin í Pedagogfelagnum er maðurin Jarvin Hansen.

Hiðani skal bert leggjast afturat, at kanska er javnstøðumaskinan ikki nóg væl smurd við olju, ella skal eitt sindur meiri til, áðrenn glið kemur á.

Williamboring gongur móti endanum

- Vit fara at senda tíðindakriv út um úrslitið av Williamboringini um ikki so leingi. Samtíðis fer eisini fyristøðufelagið BP at senda út tíðindaskriv. Hetta sigur stjórin í Jarðfeingi, Petur Joensen, nú tað eftir øllum at døma gongur móti endanum á størstu boriverkætlanini í føroysku oljusøguni

WILLIAMBRUNNURIN
Jan Müller
jan@sosialurin.fo

Oljufelagið BP er um at rigga av úti á Williamfeltinum á føroyska landgrunninum. Hetta veit Sosialurin frá vælvitandi keldum. Sambart teimum so er eisini ivasamt, um BP hevur fingið nakað burtur úr boringini. Óvissa er um, um BP í heila tikið hevur rakt við kolvetni, um komið er í gjøgnum alt basaltið og loksins, hvussu djúpt borurin er komin niður.

Hvørki Petur Joensen frá Jarðfeingi ella Hjarnar Djurhuus frá BP vilja siga nakað ítøkiligt í løtuni, tó at tað liggur í luftini, at almenningurin fer at verða kunnaður um hesa megastóru boriverkætlanina innan nakrar fáar dagar.

BP hevur borað síðani 22. oktober, men í nærum allan vetur hevur arbeiðið verið tarnað av teimum afturvendandi ódnunum. Tá man er noyddur at steðga boring vegna ringt veður gongur altíð rúm tíð, áðrenn borurin verður settur í gongd aftur, og tí kunnu vit bara gita, hvussu nógvar dagar hesar góðu fimm mánaðirnar tað ikki hevur verið borandi.

BP hevði sett út í kortið eina boriskrá at bora heilt niður á 4750 metrar. Spurningurin er, hvussu avtalan millum BP og Jarðfeingi sær út. Er t.d. avtala gjørd millum BP og Jarðfeingi um, at BP kann gevast, tá so og so nógvir dagar eru farnir ella skal borast á eitt ávíst dýpi? Vanliga mannagongdin i undanfarnu boringunum á føroyska landgrunninum hevur verið, at fyristøðufelagið bindur seg til at bora niður á eitt ávíst dýpi.

Um so er, at BP vegna vánaliga veðrið er langt frá ætlaða málinum á nærum 5000 metra dýpi og hevur brúkt so langa tíð, nú hevur gjørt av at gevast kanska á 3500 til 4000 metra dýpi, so verður hetta eitt vónbrot fyri onnur oljufeløg, sum skulu til at bora seinni og sum hava sæð fram til at keypa upplýsingar frá BP um løgini og jarðfrøðina har niðri í dýpinum. Hetta eru tó alt gitingar og metingar og skulu tí takast við størsta fyrivarni.

Undan boringini metti BP, at hon fór at taka 3 til 4 mánaðir og at kosta einar 350 mill. Kr. Nú hevur boringin tikið góðar 5 mánaðir, og kostnaðurin man fara at liggja nærri teirri hálvu milliardini, tá avtornar.

Mangt bendir á, at borurin umborð á Transocean Rather verður tikin endaliga uppaftur í næstum.

Oljumálaráðharrin vitjaði á Jarðfeingi

OLJA
Jan Müller
jan@sosialurin.fo

Í farnu viku vitjaði Tórbjørn Jacobsen, oljumálaráðharri á Jarðfeingi, har hann fekk eina gjølliga frágreiðing um, hvussu Jarðfeingi arbeiðir, hvørjar uppgávurnar eru og hvørji mál kolvetnisfyrisitingin raðfestir høgt.

Petur Joensen, stjóri á Jarðfeingi sigur, at tey høvdu ein sera góðan fund við nýggja landsstýrismannin, har hann fekk innlit í allar tær uppgávur og øki, sum Jarðfeingi fevnir um. Her ma. kolvetnismál og orkumál.

Uppskot til 3. útbjóðing kemur til 1. viðgerð á tingi 2. Apríl. Henda viðgerð var eisini undir seinastu samgongu, men av tí at løgmaður skrivaði út val í ótíð, datt hetta uppskotið av borðinum. Tí er neyðugt við nýggjari viðgerð á tingi.